Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Eyka skip til Suðuroynna

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at fáa eyka skip at stuðla Smyrli á Suðuroyarleiðini?
2. Hvussu langt er arbeiðið komið við at finna eina varandi loysn til trupulleikan við at fáa farm til og frá Suðuroynni?

Viðmerkingar:
Øll vinnan í Suðuroynni savnaði avvarðandi myndugleikar og politisku skipanina í november 2020, har tað staðiliga bleiv víst á áhaldandi og vaksandi trupulleikan við at fáa farm til og frá Suðuroynni. Partarnir samdust um, at ein varandi loysn skuldi finnast beinanvegin. Einki hevur verið at frætta síðan fundin. Seinkingar eru gerandiskostur, og bilar standa oftari og oftari eftir. Ferðandi hava trupult við at leggja sínar ferðir til rættis, tí tað er sjáldan nøkur trygd fyri, at tey fáa síni akfør við. Ferðandi, sum skulu av landinum, mugu aloftast av oynni dagin fyri, um tey skulu vera vís í at náa flogfarið. Einasta loysnin, sum kann taka trýstið av Smyrli beinanvegin, er at fáa eina nýggja farmaleið á Suðuroyarleiðini. Tað hevur Strandferðslan víst á í fleiri umførum. Framtíðarútlitini fyri Suðuroynna vísa ein áhaldandi vinnuligan vøkstur, stóran áhuga fyri at flyta til oynna og seta búgv, umframt fleiri og fleiri ferðafólk, sum ynskja at vitja Suðuroynna. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 12. august 2021

Bjarni Hammer